Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Námsfrøðilesandi

Spurningar:

1. Hví er námsfrøði ikki raðfest í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2022, so ein flokkur aftrat kann takast inn at lesa námsfrøði á Fróðskaparsetrinum?
2. Hvørjar nærri greiningar skulu gerast innan námsfrøðiútbúgvingina?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at raðfesta námsfrøðilesandi, og um so er, nær koma ítøkiligar broytingar á økinum?

Viðmerkingar:
Tørvurin á námsfrøðingum er stórur. Føroya Pedagogfelag hevur upplýst, at umleið 300 námsfrøðingar og hjálparfólk longu eru 60 ár ella eldri. Almannaverkið fær brúk fyri 700 nýggjum starvsfólkum komandi 10 árini, og tí er neyðugt at útbúgva fleiri námsfrøðingar sum skjótast. Hetta er átrokandi, og landsstýrismaðurin hevur fyrr upplýst, at tað er partur av ætlanunum hjá honum. Men tá hugt verður í fíggjarlógaruppskotið fyri 2022 verður bara skrivað, at «nærri greiningar skulu gerast». Tað er týdningarmikið fyri námsfrøðiliga økið, foreldur og børnini at vita, nær økið verður raðfest, so vit kunnu fáa skil á starvsfólkatrotið. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 04.10.2021

Djóni Nolsøe Joensen